# Mótarbeiða ikki landsstýrinum

*-Vit hava á ongan hátt mótarbeitt landsstýrinum í samráðingunum við danir sigur Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, sum tvørturímóti gevur landsstýrinum ábyrgdina av, at sjálvstýrismálið er steðgað upp. Tað átti annars at verið ein fólkasak*

JAN MÜLLER

-Tá Høgni Hoydal í samrøðu við Sosialin fríggjadagin leggur upp til, at andstøðan á tingi mótarbeiðir landsstýrinum í samráðingunum við danir, so haldi eg kann siga vegna alla andstøðuna, at hóast vit ikki eru samd við landsstýrið, so hava vit á ongan hátt mótarbeitt landsstýrinum. Tvørturímóti hevur man sagt, at vit tvørturímóti virða landsstýrisins rætt til at føra samráðingar og at man ikki vil leggja nakrar sum helst forðingar í vegin. Hatta sigur formaður Javnaðarfloksins í eini viðmerking. Hann vísir á, at hann fult út virðir landsstýrisins rætt til at samráðast, og tí heldur ikki vilja vera partur av ferðini hjá Uttanlandsnevndini til Christiansborg. Tað er eitt prógv um tað sama. Tað er landsstýrisins suverena heimild til at føra samráðingarnar. Andstøða og løgtingið blíva ikki aktuell fyrr enn málið er komið heimaftur til Føroyar.

At landsstýrið ikki hevur andstøðuna og alt løgtingið aftanfyri í samráðingunum heldur formaður Javnaðarfloksins verða ein spurning um, hvussu uppleggið hjá landsstýrinum sær út.

-Nú valdu teir at gera eitt upplegg, sum lá uttanfyri pínumarkið hjá Javnaðarflokkinum, og tá er einki at gera. Man kann ikki bara seta sítt egna programm upp og so rokna við, at hinir koma við sum frálíður sigur Jóannes Eidesgaard, sum heldur tað vera sera harmiliga fyri sjálvstýrissakina sum so. Ein sjálvstýrisrørsla eigur at verða ein fólkasak, og tað bleiv hon tíanverri ikki hjá okkum føroyingum.

## Landsstýrismaðurin leggur seg ikki út í stríðið í kirkjuni

JAN MÜLLER

-Landsstýrismaðurin í kirkjumálum fer ikki at leggja seg út í tað innanhýsis stríðið, sum er í kirkjuni í løtuni. Hetta er eitt mál, sum kirkjan eigur at greiða innanhýsis, og vónandi verður tað greitt skjótast gjørligt, soleiðis at man kann sleppa undan tí eljustríði, sum er frammi í fjølmiðlunum sigur Høgni Hoydal, sum umsitur kirkjumál í landsstýrinum. Hann heldur, at tað er ikki ein spurningur fyri landsstýrismannin og eiheldur fyri landpolitikarar, hvat gongur fyri seg innanhýsis í føroysku fólkakirkjuni.

Høgni Hoydal vísir annars á, at føroyska fólkakirkjan er ein donsk kirkja, og tí áttu fjølmiðlarnir heldur at spurt danska kirkjumálaráðið. Fólkakirkjan er ikki føroyskt øki.


FRAMSÝNING
í Smiðjuni í Lítluvík
við Helga Joensen og Anker Eli Petersen

| | |
|---|---|
| Sunnudag 4. juni | kl. 14.00 - 20.00 |
| Mánad. 5. - leygard. 10. juni | kl. 11.00 - 20.00 |
| Sunnudag 11. juni | kl. 14.00 - 20.00 |

SANSIR TEL 355 355

3arin
SMS · Tel. 353535 · Fax 353536
E-mail: tryarin@post.olivant.fo


# Føroya Kolvetni kann verða steðgað

*-Vit umhugsa støðuna í løtuni, men tað er greitt, at vit fáa ikki arbeitt uttan jarðfrøðiligu ráðgevingina frá Sagex sigur Nils Sørensen frá Føroya Kolvetni. Sambart Dagbladet fer Norsk Hydro at steðga Føroya Kolvetni, fær tað viðhald í landsrættinum móti ráðgevunum hjá føroyska oljufelagnum*

JAN MÜLLER

-Det kan blive aktuelt, at Føroya Kolvetni må trække sig fra første konsessionsrunde på Færøerne på grund af den koblingen de har haft med de tre norske geologene. Vi vil hindre retstridig brug af forretningshemmeligheder i en konkurrancesituation med Norsk Hydro.

Hetta sigur talskvinna fyri Norsk Hydro í samrøðu við norska blaðið „Dagbladet", sum kemur út leygardagin. Tað fær Sosialurin váttað frá Per Ellingsen, blaðmanni. Sambart blaðnum vísir talskvinnan hjá Norsk Hydro á, at hetta fer at verða avgjørt seinni og minnir í hesum førinum á, at fútaforboðið móti teimum trimum fyrrv. sagafólkunum er vorðið kært til landsrættin. Tað liggur í kortunum, at um Norsk Hydro vinnur aftur í landsrættinum, so verður umrødda krav móti Føroya Kolvetni gjørt galdandi.

Tað var herfyri, at Norsk Hydro fekk viðhald í einum undirrætti í Oslo í einum kravi móti trimum fyrrv. sagafólkum, sum hava verið ráðgevar hjá Føroya Kolvetni í sambandi við at lata umsókn inn til 1. útbjóðing við Føroyar. Annars hevur ein stórtingslimur reist spurningin viðvíkjandi Norsk Hydro og Føroya Kolvetni politiskt og sett vinnumálaráðharranum fyrispurning. (Hesin varð prentaður í Sosialinum hósdagin, blaðm.)

Tá Sosialurin vendi sær til Norsk Hydro hósdagin vistu tey einki um, at ein fyrispurningur av hesum slag er settur ráðharranum. Brynjolv Kløve, sum stendur á odda fyri altjóða leiting hjá Norsk Hydro sigur við Sosialin, at felagið ongan áhuga hevur í at steðga Føroya Kolvetni í 1. útbjóðingini, sum tað annars framgongur av fyrispurninginum til norska vinnumálaráðharran og nú eisini í grein í Dagbladet í dag.

-Vit síggja onga orsøk vera til at steðga Føroya Kolvetni. Vit hava fingið at vita frá felagnum, at teir hava tikið út úr umsókini tað, sum er í stríð við fútaforboðið móti teimum trimum ráðgevunum hjá Føroya Kolvetni.

*Niels Sørensen*

Tá vit spurdu Nils Sørensen, stjóra í Føroya Kolvetni, hvussu alt hetta málið ávirkar teirra arbeiði sigur hann, at teir duga ikki at síggja, at hetta málið hevur nakað við Føroya Kolvetni at gera. Talan er um eitt mál millum Norsk Hydro og tey trý Sagexfólkini. Hann viðgongur tó, at málið hevur ørkymlað teir, og at tað hevur gjørt, at teir hava ikki fingið arbeitt víðari við útbjóðingini, nú Sagexfólkini vóru jarðfrøðiliga ráðgevingin og ein kjarnin í jarðfrøðiliga arbeiðinum hjá Føroya Kolvetni. -Vit umhugsa nú støðuna, og skuldi tað hent, at Norsk Hydro fær viðhald í landsrættinum og tað fer at krevja, at vit ikki skulu verða við í útbjóðingini, so mugu teir til at prógva, at vit brúka tilfar, sum eftir teirra tykki ikki er lógligt at brúka sigur Nils Sørensen, sum metir teirra støðu í løtuni sum eina bíðistøðu.

Sosialurin skilur, at tað er rættiliga stórur spenningur í Noregi um, hvat landsrætturin fer at gera við málið. Ein kelda blaðið hevur tosað við sigur, at ein avgerð kann fara báðar vegin. Talan er um eitt rættiliga prinsipielt mál, sum snýr seg um, nær starvsfólk í eini fyritøku, tey eru farin frá, kunnu brúka sína vitan hjá eini aðrari fyritøku. Aftrat hesum kemur nú eisini fyrispurningurin til vinnumálaráðharran.

# Ikki nøkur haldbar loysn

JAN MÜLLER

-Hetta er eitt innanhýsismál í Tjóðveldisflokkinum, og tá tað er búgvið til at koma út, hvat vit gera, fær almenningurin sjálvandi nakað at vita. Hetta sigur Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins í sambandi við tíðindini um, nær nýggjur landsstýrismaður skal setast at røkja undirvísingar- og mentamál. Tá hevur ljóðað, at tað hevur verið eitt ynski í Tjóðveldisflokkinum at seta nýggjan landsstýrismann, men at ein meiriluti í leiðsluni í flokkinum vildi ikki hava, at nakar verður settur í starvið soleingi kanningin av Signar á Brúnni og Sjónvarpsmálinum er í gongd.

Uppá fyrispurning um hann er førur fyri at umsita øll hesi málsøkini einsamallur sigur Høgni Hoydal, at hann hevur roynt at fingið tingini at ganga upp, men tað merkir, at hann hevur havt ein arbeiðsdag uppá 14 ella fleiri tímar. -Tað er ikki nøkur haldbar loysn. Men hetta er eisini ein fyribilsloysn vísir hann á.

Hvussu leingi hon verður verandi fyribils hevur hann onga viðmerking til. -Tað einasta eg kann siga er, at leiðslan í Tjóðveldisflokkinum hevur ikki samtykt nakað í hesum sambandi.

Løgmaður segði annars við sjónvarpið hóskvøldið, at eingin játtan er til setan av nýggjum landsstýrismanni fyri Signar á Brúnni, og hann metti tað mest náttúrligt at bíða við at biðja um eina eykajáttan til í ólavsøkutingsetuni. Signar á Brúnni hevur rætt til at fáa landsstýrismannalønina í eitt hálvt ár, eftir at hann er farin frá. Løgmaður metti tað ikki vera óforsvarligt at lata Høgna Hoydal, sum eisini umsitur lógarmál, hava málsøkini hjá Signari á Brúnni.



# Flóttafólk: Nyrup skar ígjøgnum

*Seinnapartin í dag leg›i danski forsætismálará›harrin seg út í máli› um flóttafólkini og gav tólv av nítjan serbisku flóttunum uppihalds- og arbei›sloyvi í Føroyum. Á›renn ta› hev›i embætisma›ur úr Innanríkisrá›num bi›i› føroysku hjálparfólkini vera millumgongufólk til landsst‡ri › fyri at fáa máli› politiskt vi›gjørt í Føroyum, grei›ir Jákup Pauli Olsen frá*

SVEINUR TRÓNDARSON

Í langa tí› hevur máli› um serbisku flóttafólkini, sum hava bi›i› um arbei›s- og uppihaldsloyvi í Føroyum, ligi› sum ein marra á donsku stjórnini, men eftir henda dag, er máli› so at siga loyst. Tólv av teimum nítjan, hava fingi› uppihalds- og arbei›sloyvi í Føroyum, og tann, sum »avgreiddi« máli› í Danmark, var sjálvur forsætisrá›harrin.

- Fyri heilt fáum døgum sí›ani tosa›i eg vi› innanríkisrá›i›, og har var svari›, at teir skuldu hava eina játtan úr Føroyum á›renn loyvi var givi›, og úr Føroyum høvdu tey frætt, at ha›ani kom einki meir. Tí seg›i embætisma›urin vi› meg, at ta› sá út til, at flóttafólkini fóru at fáa avslag, sigur Jákup Pauli Olsen, í telefonini úr Lemvig.

Jákup Pauli hevur strí›st fyri at fáa serbunum arbei›sloyvi› í Føroyum, men ta› hevur veri› eitt tógvi› strí›. Í fyrsta umfari var stø›an tann, at slavonararnir høvdu søkt um fri›skjól í Danmark, men høvdu fingi › nei. Og sambært n‡ggju donsku lógini kunnu fólk, sum hava fingi› nei, ikki søkja eina fer› afturat. – Men ta› kunnu tey í Føroyum, sigur Jákup Pauli Olsen, sum vísir á, at n‡ggja danska útlendingalógin er ikki sett í gildi í Føroyum.

- Ta› er kanska eisini orsøkin til, at danska umsitingin hevur veri› so tung at arbei›a vi› í hesum máli, sigur Jákup Pauli.

Hann hevur serbanna vegna gjørt eitt stórt arbei›i fyri at fáa Innanríkisrá›i› at geva loyvi, tí serbarnir hava bæ›i fingi› arbei›i og tak yvir høvdi› í Føroyum, so har var einki at koma eftir, hjá myndugleikunum. Og í fyrsta umfari var ikki naka›, sum bar á ta› bor›i›, at umsóknin skuldi fáa so drúgva vi›ger›, sum hon einafer› fekk.

- Tá vit tosa›u vi› Innanríkisrá›i› í fyrstani bendi alt á, at loyvini vór›u skjótt avgreidd. Men so vi› og vi› sást, at okkurt ikki var sum ta› átti, og ta› einu fer›ina vit tosa›u vi› teir, seg›i skrivstovustjórin, at svari› úr landsst‡rinum var ikki nøktandi, og at útlit ikki vóru til at fólkini fingu loyvi› til at fara til Føroyar, sigur Jákup Pauli.

Hann grei›ir frá, at ta› sást á øllum brøgdum, at danir vildu ikki taka ábyrgdina fyri hesum máli, hóast ta› er greitt ásett, at ta› er danskt málsøki›. – Ta› kann sjálvsagt geva teimum trupulleikar. Í veruleikanum eru tvær útlendingalógir galdsandi í Danmark, og ta› er ikki so heppi›. Donsku embætisfólkini hava gjørt ein brølara, og í hesum føri royna tey at kasta landsst‡rinum eina ábyrgd, sum hon einki eigur í, sigur Jákup Pauli, sum samstundis sigur, at Føroya Landsst‡ri hevur vi›gjørt máli› júst sum ta› skal.

*Ikki fyrr enn stjórnin leg›i upp i máli› var ta› loyst, sigur Jákup Pauli Olsen*

- Úr Føroyum hava vit fingi› vir›iliga vi›ger›, men ta› er meir enn vit kunnu kalla› ta›, sum er fari› fram í Innanríkismálará›num. At Nyrup kemur upp í máli› nú er ein kombinatión av ymsum faktorum. Samrá›ingarnar vi› Føroyar eru heilt vist ein teirra, men vit skulu ikki gloyma, at júst hetta máli› hevur vakt ans millum fjølmi›lar í Danmark. Dag og dagliga hava vit sæ› myndir úr Eystur-Slavonia, sum vísa ræ›uleikarnar har, og í me›an hava hesi fólkini rikist, sum bukka ímillum sengur. Danski veljarin hevur sta›i› spyrjandi tí eingin fatar hvat ta› er, sum stjórnin hevur vavt seg út í. Ta› vildi Nyrup loysa her og nú, tí annars kundi máli› spøkt langt inn í danska summari › og skatt umdømi hjá stjórnini. Ta› hev›i ikki veri › heppi› í sambandi vi› evruatkvø›ugrei›sluna, sigur Jákup Pauli Olsen.

Danir vildu hava máli› politiskt vi›gjørt í Føroyum, men ta› vildu føroyingar ikki. Embætismannaverki› í Danmark klára›i harafturímóti at fáa máli› politiskt vi›gjørt í – Danmark.

# Mugu gera felags arbei›i

*- Ta› krevur nógv av flóttafólkunum, skulu tey gerast ein partur av føroyska samfelagnum, men ta› krevur eisini, at vit sum føroyingar vísa vilja til at lata tey gerast ein partur av okkara samfelag, sigur Jákup Pauli Olsen, sum hevur arbeitt sera hart fyri at fáa serbarnar til Føroya*

SVEINUR TRÓNDARSON

Ta› var ein t‡›uliga léttur Jákup Pauli Olsen, vit høvdu í telefonini úr Lemvig í dag. Hann gongur á læraraskúla har, men ta› er ikki tí, at navn hansara er kent í Føroyum hesa tí›ina. Hann hevur úr Lemvig strí›st fyri at fáa serbunum uppihalds- og arbei›sloyvi í Føroyum, og tá ta› í dag brast fyri nev í málinum, fall ein steinur frá hjarta hansara.

- Tú kanst ætla vit eru fegin. Hetta er ta›, sum vit hava strí›st fyri alla tí›ina, og hóast ta› hevur tiki› órímiliga drúgva tí›, so er ta› gott at ta› er um at vera li›ugt, sigur hann.

Um at vera li›ugt sigur hann tí, at enn hava bara tólv av teimum nítjan fólkunum ta› sn‡r seg um fingi› ney›ugu loyvini. Hini mugu bí›a eina tí› enn, men tá eisini tey hava bæ›i arbei›i og tak yvir høvdi, so eru útlit til at máli› nú skjótt ver›ur endaliga avgreitt.

Tey flóttafólkini, sum koma nú, skulu búgva á Glyvrum og á Toftum, og tey hava øll fingi› arbei›i. talan er um tvær familjur, í a›rari eru tvey vaksin og f‡ra børn, me›an ta› í hinari eru tvey foreldur og tr‡ gott og væl hálvvaksin børn.

Men ta› er ikki bara sum at siga ta›, at flyta til eitt mentaliga so fjart land, sum Føroyar. Ve›ri› er ø›rvísi›, landslagi› er ø›rvísi› og mentanin so sanniliga eisini. Heldur Jákup Pauli at tey kunnu gerast ein partur av føroyska samfelagnum, solei›is at tey fara at trívast?

- Hjá teimum er alt ø›rvísi enn heima. Onkur teirra hevur arbeitt í skógarídna›inum, og ta› ver›ur torført í Føroyum, men eisini ta›, at tey sleppa at búgva fyri seg er ø›rvísi. Seinastu tíggju árini hava tey bara runni› undan. Ta› skulu tey venja seg av vi› nú. Men ta› krevur sjálvandi, at tey gera eitt stórt arbei›i sjálvi solei›is at tey vísa vilja til at gerast ein partur av føroyska samfelagnum, sigur Jákup Pauli.

Men ta› eru nú ikki bara flóttafólkini, sum skulu vísa vilja. Føroyingar og føroyska samfelagi› skulu eisini vísa grei›an vilja til at flóttafólkini gerast ein partur av okkara samfelag. Hetta l‡sir Jákup Pauli í tveimum.

- Fyri ta› fyrsta skal nærumhvørvi› gera ein stóran innsats, solei›is at flóttafólkini kenna seg vælkomnan. Tí beri eg ongan ótta fyri í Føroyum, tí hóast vit ikki eru von vi› flóttafólk, so eru vit kortini ikki bangin fyri at »nerta« vi› tey, sigur Jákup Pauli. Hann leggur afturat, at flóttafólkini ver›a móttikin av einum bólki, sum fer at hjálpa teimum, og børnini skulu, sum vera man í skúla. ta› er alt komi› upp á pláss.

- Hitt er, at almennu Føroyar eisini eiga at vísa ein vilja til at gerast ein partur av heimssamfelagnum vi› øllum tí, sum hoyrir til. Vit vilja fegin gerast sjálvstø›ug, og ta› bindur eisini úteftir. Vit kunnu ikki bara senda ein kekk og so siga, at vit hava hjálpt. Ta› er ikki nóg miki›. Vit eiga eisini at taka ímóti flóttafólki, og geva teimum møguleika at gerast ein partur av okkum – vi› øllum tí, sum fylgir vi› – ágó›um og skyldum, sigur Jákup Pauli.

Fyrsta stigi› er nú tiki›, og ta› merkir, at fyrstu almennu flóttafólkini eru ávegis til Føroya, og um stutta tí› fara tey gera sítt til, at tey gerast ein partur av Føroyum. So er ta› upp til okkara at vísa, at tey eru vælkomin til hetta landi›, sum hvørki hevur skógir, trø› ella nógvan hita.

Føroyingar vita, at her er gott at vera og hiti kann mátast á annan hátt enn bara í stigum...

...úr Føroyum 7. juli, 21. juli og 4. august

## Costa Dorada

Flogfelag Føroya skipar aftur í ár fyri ferð til gullstrondina í Spania, Costa Dorada. Flogið verður beinleiðis úr Føroyum 7. juli, 21 juli og 4. august.

Gist verður í kenda feriubýnum Salou, ið liggur við stóru Costa Dorada strondina. Beint við liggur tað størsta stuttleikastaðið, Port Aventura, umframt tað stóra "Vatnlandið". Eisini verður skipað fyri útferðum.

Møguleiki er at velja ímillum 3 ymisk hotel ella íbúðir.

Ring ella støkk inn á gólvið og fá meira at vita um hendan frálíka møguleikan.



PRÍSDØMI:
Hotel Michelangelo
**+, 2 fólk............. 8.900,- pr. pers.
1/2 pens.
Bólkur min. 10 fólk..... 7.900,- pr. pers.
1/2 pens.

PRÍSDØMI:
Hotel Europa
***, 2 fólk........ 9.100,- pr. pers.
1/2 pens.

PRÍSDØMI:
Íbúð Uolas ella íbúð Aqurio
***, 4 fólk........ 6.800,- pr. pers.

PRÍSDØMI:
Hotel Estival Park
****, 2 fólk......... 10.250,- pr. pers.
1/2 pens.

ÚTSELT 7. JULI OG 4. AUG.

Í øllum prísum er íroknað: Flogferð, ferðaavgjøld og innivist

• Avsláttur fyri børn 2-12 ár: 1.500,- kr. umframt hópin av øðrum avsláttarskipanum. Kom inn og hoyr nærri...

FLOGFELAG FØROYA
Áarvegur 6 • Postboks 3225 • FO-110 Tórshavn
Tel 31 10 25 • Fax 31 86 70 • e-mail: travel@ff.fo

petur & petur • 320870